Tryggingareftirlitið

Tórshavn 11. november 2016
Journalnr.: /00162-6

Til móttakaran á viðhefta yvirliti

**Uppskot til kunngerð um gjaldføri (solvens) og rakstraræltanir hjá tryggingarfeløgum**

Tryggingareftirlitið sendir við hesum *Uppskot til kunngerð um gjaldføri (solvens) og rakstraræltanir hjá tryggingarfeløgum* til hoyringar, sí viðhefta fylgiskjal.

Uppskotið til kunngerð tekur útgangsstøði í Finanstilsynets *bekendtgørelse nr. 1313 af 08/12/2014 om solvens og driftsplaner for forsikringsselskaber*, ið er seinast solvenskunngerðin, ið var galdandi fyri donsku tryggingarfeløg áðrenn farið varð yvir til Solvens II reglurnar tann 1. januar 2016.

Fyri at fyrireika tey donsku tryggingarfeløgini til nýggju reglurnar, hevur Finanstilsynet seinnu árini dagført solvenskunngerðina, soleiðis, at hon í høvuðsheitum svaraði til nýggju Solvens II reglurnar, áðrenn hesar formliga komu í gildi í Danmark.

Aftaná 1. januar 2016 verða ásetingarnar í Danmark um at gera upp solvens fyri sonevndu bólk 1 tryggingarfeløgini ikki longur ásettar í kunngerð, men í ES-fyriskipan, ið er beinleiðis galdandi í øllum ES-londunum.

Við at taka útgangsstøði í umrøddu donsku solvenskunngerðini (nr. 1313 af 08/12/2014) verða solvensreglurnar fyri tey føroysku tryggingarfeløgini at kalla tær somu, ið eru galdandi fyri tryggingarfeløg í ES, ið gera upp solvens eftir sonevnda standardmodellinum í Solvens II regluverkinum.

Høvuðsinnihaldið í uppskotinum til kunngerð verður lýst nærri í *Notat om udkast til ny bekendtgørelse om solvens og driftsplaner for forsikringsselskaber*, sí viðhefta fylgiskjal.

Nýggja kunngerðin um gjaldføri (solvens) og rakstraræltanir hjá tryggingarfeløgum verður eftir ætlan sett í gildi 1. januar 2018.

Møguligar viðmerkingar til uppskotið skulu vera Tryggingareftirlitinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. januar 2017. Viðmerkingar og spurningar kunnu sendast við telduposti til gn@tryggingareftirlitid.fo ella til Tryggingareftirlitið stílað til Gudmundur E. Nónstein, Skálatrøð 20, Postboks 73, FO-110 Tórshavn.

Um munandi broytingar verða gjørdar í uppskotinum til kunngerð, er ætlanin at senda eitt dagført uppskot til hoyringar, áðrenn kunngerðin verður sett í gildi.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein